# Lívligt og kryddað við Woody Wright

**Fyrstur á pall á Fjarðafestivalinum var amerikanski singer/songwriter Woody Wright. Framførslan var bæði lívlig, rólig, innilig og hugnalig**

UMMÆLI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Woody Wright er ein ektaður undirhaldari í besta amerikanska stíli*

At Woody Wright er royndur countrysangari sást aftur, tá hann var á pallinum sum tann fyrsti á Fjarðafestivalinum 2008. Meðan hann førdi fram var hann sera róligur, útattil sera náturligur og sá ikki út til at ovmøða seg á nakran sum helst hátt. Hann sá út til at hava fult tamarhald á støðuni, og hevði fjøldina í síni hollu hond.

Um Woody Wright kann sigast at hann er ein ektaður undirhaldari í besta amerikanska stíli. Men fyri at koma inn á tónleikin var tað eitt minus, at hann í byrjanuni sang playback. Men hetta var tó skjótt broytt, tá hann, sum ein ektaður countrysangari tók guitarin í hondina og fór at spæla undir.

Ímillum sangirnar prátaði hann nógv, og sambandið við jøldina var sera gott, kanska eitt tað besta eg havi sæð. Hann segði eisini sjálvur tíðliga undur framførsluni, at »we are going to make ourselves feel like at home«, og tað má sigast at tað gjørdi tað eisini.

Konsertin var sera góð við tað at hon, sum Woddy Wright so vant, hevði fleiri skiftandi hugløg. Nøkur løg fingu fólkini at klappa við í takt, onnur vóru meira innilig og uppaftur vóru onnur skemtilig. At hann so eisini fekk unnustu sína við á pallin, gav eyka krydd til eina longu frálíka samanseting.

Samanumtikið ein sera góð byrjan á ein spennandi Fjarðafestival við eini sera áhugaverdari skrá.

# Instrumentalt genialt

**The Isaacs vístu verulig kynstur á eini ørgrynnu av ljóðførum og einari ótrúligari ljóðmynd, tá tey spældu á útipallinum á Fjarðafestivalinum**

UMMÆLI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tey eru kend í Gaither høpi, og í sær sjálvum skuldi tað boða frá sera góðari góðsku. Og tað var júst hetta, vit fingu á Fjarðafestivalinum. Framúr góðsku á øllum økjum. Við einari framúrskarandi og fjølbroyttari ljóðmynd undirhildu The Isaacs fyri allar pengarnar á útipallinum á Fjarðafestivalinum.

Ljóðmyndin var sera fjølbroytt á tann hátt, at tey spenna sera víða instrumentalt. Tað var sera frískligt at hoyra tey ymisku streingjaførini, frá violin til mandolin, akustiskan guitarleik og tann djúpa bassin, ið har til hoyrdi.

Sangurin var á rættiliga høgum stigi í allar mátar, og løgini vóru eisini sera fjølbroytt. Tey spældu friðarlig løg, ið veruliga nomu við innastu kenslurnar, lívlig løg, ið góvu hvørjum limi á kroppinum hugin at dansa og harafturat fleiri løg mitt í millum.

Tann andaligi parturin lá heldur ikki eftir, og lovprísan var í ríkiligt mát. Familjubólkurin við teimum ísraelsku røtrunum megnaði veruliga at sameina blue-grass við gospel og country, og at siga um hesa framførsluna er, at hon uttan iva er verd at uppliva.



*ið einari framúrskarandi og fjølbroyttari ljóðmynd undirhildu The Isaacs fyri allar pengarnar á útipallinum á Fjarðafestivalinum*